



*Tey fýra heystlombini hevur hann í seyðahúsinum í túninum. Um summarið verða teir sleptir í bjørgini í Saksun at ganga.*

Samuelsen og konuna, sum eru røsk at vitja stórbýirnar í Evropa. Tær flestu ferðirnar Eilif Samuelsen annars leitar sær úr loftsskrivstovuni og út um Havnina, gongur leiðin ofta norðeftir.

- Barndómsheimið hjá mær í Fuglafirði er enn í familjuni, og kann nýtast av okkum øllum. Men ofta fara eg og konan til Saksunar, har vit hava hús at fara til, sum hoyra til familjuna hjá konuni, ella til Víkar, har vit fýra brøður eiga barnaheimið hjá abba. Ljósu tíðina dámar mær at gera túrar til Víkar, at seta meg at skriva. Tá skrivi eg frá morgni til myrkurs, sigur hann.

Hann koyrir altíð sjálvur, og meðan hann er í Vík, tekur hann sær steðgir frá skrivingini, og ger sær túrar niðan í fjøllini, og hvønn dag gongur hann túrin til Tjørnuvíkar og aftur.

- Eg havi altíð gingið nógv, og fari nógvar túrar niðan í fjøllini kring Havnina um árið. Eg haldi, at tað er ein skylda, at halda likamið sunt, og eg royni at halda meg sunnan við at eta rætt, sigur Eilif Samuelsen.

## Nuanserað føroyskt

Tað, sum Eilif Samuelsen skrivar, eru klassiskar, filosofiskar bøkur, sum hann týðir til føroyskt.

- Eg gjørdist so hugtikin av Játtanir Augustinusar, at eg keypti mær eitt upprunaeintak av bókini, og lærdi meg nakað av latíni, so eg kundi fylgja tekstinum til fulnar. At skriva og at týða er eitt gamalt áhugamál hjá mær, og eg týddi eisini onkrar skúlabøkur til føroyskt, meðan eg arbeiddi sum lærari. Eg undirvísti eitt sindur í føroyskum, og havi stóran áhuga fyri málinum. Føroyska málið er nógv ment seinastu árini, og er vorðið meir nuanserað, haldi eg. Og tað er neyðugt fyri at skriva lesiligt nútíðarmál. Mann má raka røttu stílleguna, alt eftir tekstaslagi, sigur hann.

Eilif Samuelsen eigur og rekur sítt egna forlag, Hemlið. Útgávurnar hjá honum eru vorðnar fýra í tali, og fleiri eru ávegis. Harímillum er ein við kinverkskum ævintýrum, sum hann situr og arbeiðir við.

- Fyri meg er tað ikki av alt avgerandi at bøkurnar hjá mær enda ovast á sølulistunum. Men eg meti tað vera av stórum týdningi, at fáa bøkur til vega á føroyskum máli, ið kunnu lata upp aftur eftir í tíðina. Játtanir Augustinusar er skrivað í 400 talinum, og ein bók eftir Thomas Aquinas í 1200 talinum, og bókin um Abelard og Heloise er frá 1100 tálinum. Tað, sum hugtekur meg, er millum annað tað, at fólkini, sum livdu fyri so langari tíð síðan, høvdu júst somu kenslur, sum vit hava í dag. Og eg haldi, at vit eiga at virða tað gamla. Á tann hátt fáa vit íblástur til endurnýggjan, sigur Eilif Samuelsen.

## Telda fyri 25.000 krónur

Nei, tíðin sum pensionstur fellir ikki long fyri Eilif Samuelsen. Skrivingin er tíðarkrevjandi, og hann er ikki bangin fyri at seta seg inn í nýggj ting, ið krevja hansara uppmerksemi. Hann fer ikki av fetanum uttan sína fartelefon, og er hann eisini at finna á stóru netverksheimasíðuni, Facebook.

- Eg havi einar 100 vinir har. Eg eri ikki hvønn dag har inni, tað fer við ov nógvari tíð. Men eg kenni nógv fólk har. Fleiri av mínum vinum eru gamlir næmingar. Tað er stuttligt at síggja. Tað er eisini fløvandi at síggja, at tey minnast aftur á, og senda mær eina heilsan av og á, sigur hann.

Eilif er ein av teimum, ið sær stórar møguleikar í tøknini. Tíðliga 1980 árunum var hann á telduskeiði hjá Com-Data Klaksvík, og miðskeiðis í 1980 árunum keyti hann sær sína fyrstu teldu. Tað er tann dýrasta teldan hann hevur havt, og tann ið dugdi minst, og hon kostaði 25.000 krónur. Í dag hevur hann tvær standandi, eina stationera og eina farteldu. Farteldan er hent at hava við til Víkar, har allar orðabøkur eru lagdar inn á. Geymin er heldur ikki fremmandur fyri Eilif, ið brúkar geyman til at goyma sínar bøkur á.

- Fartelefonin er sum ein lummabók fyri meg. Tá mann er komin til árs, og kanska er vorðin nakað dólskur, er hon útmerkað sum áminning. Og tá eg ferðist, brúki eg hana til vekjara, sigur hann.

Hvønn sunnudag er Eilif Samuelsen at finna í Vesturkirkjuni.

- Eg eri deknur í Vesturkirkjuni. Tað er gamalt lærarastarv, at vera deknur, og vit trý sum skiftast um at vera deknur, eru øll lærarar. Tá eg so ikki eri deknur, syngi eg uppi við orgulið, greiðir hann frá.

Harafturat er Eilif limur í kirkjuráðnum, har hann tekur sær av roknskapinum. Honum dámar væl at syngja, og møtir trúliga upp í tilhaldinum hvønn týsmorgun, tá sangur er á skránni. Fýra heystlomb hevur hann í lítla seyðahúsinum í túninum. Teir hevur hann standandi inni um veturin, og sleppur teimum um summarið leysum í bjørgunum í Saksun.

- Eg fylli 75 fyrsta dagin, og eg má siga, at tað er gott at vera pensionistur í Føroyum í dag. Møguleikarnir eru so nógvir. Skal eg samanbera við tilveruna hjá pensionistum í 1940-50 árunum, var Føroyar eitt heilt annað samfelag tá. Tá vóru umstøðurnar at kalla ússaligar, ellisrentan strekti ikki langt, og tað var trupult at tjena sær nøkur eyka oyru, serliga í fimtiárunum, sum vóru merkt av arbeiðsloysi. So mann má siga, at tíðirnar eri nógv broyttar hesi árini, sigur Eilif Samuelsen.